**VÁGS KOMMUNA**
Vágsvegur 30 • FO-900 Vágur • Tel. 66 30 00 • Fax 23 93 01 • Føroyar (Faroe Islands)
t-post: vagur@vagur.fo • www.vagur.fo

Vágur, 16. februar 2022
Journal nr.: 21/00319
Viðgjørt: Jákup Olsen

Til FORMO
Bakkavegur 8
625 Glyvarar

**Viðvíkjandi umsókn vegna P/F Bakkafrost um byggiloyvi til smoltstøð í Ónavík.**

Vágs kommuna hevur gjøgnumgingið umsókn frá Bakkafrost Farming, Bakkavegur 9, 625 Glyvrar, um at byggja smoltstøð í Ónavík á matr. nr. 623a, 40, 364b, 303a, 601, 129d, 378a og 558b.

Kommunan gevur byggiloyvi vísandi til niðanfyri nevndu tekningar og skjalatilfar og út frá hesum treytum:

- S25-19 Smoltstøðin í Lopra, ískoyti til YFR 10.12.
- S25-19 Smoltstøðin í Lopra ums. Byggiloyvi 30.06.2021.
- S25_K01_H0_EXN001 – Støðumynd.
- S25_(50)_EX_H1_000 – Frárenning Yvirlit.
- S25_K01_H1_E0_N101 – Flatmynd av veghædd.
- S25_K01_H1_E1_N102 – Flatmynd av 1.hædd.
- S25_K01_H1_ET_N104 – Flatmynd av tekju.
- S25_K01_H1_EX_N105 – flatmynd slambrunnur.
- S25_K01_H2_EX_N301 – Síðumyndir.
- S25_K01_H3_EX_N201 – Skurður A-A.
- S25_K01_H3_EX_N202 – Skurður B-B.
- S25_K01_H1_E0_N111 – Brunaplanur veghædd.
- S25_K01_H1_E1_N112 – Brunaplanur 1.hædd.

Fyribils loyvið verður givið til byggingina, men skal fullfíggja frárenningar- og kloakkprojekt fyriliggja áðrenn arbeiði uppá leiðingar í lendi kann byrja og dagført projekt fyriliggja áðrenn nøkur bygging kann byrja. Fyribils loyvið er bert galdandi fram til 01.02.2023 og skal arbeiði verða byrja áðren hesa freist.
Umsøkjarin skal samstundis tryggja, at verkætlanin fær neyðug loyvið frá Yvirfriðingarnevndini.
Saman við dagførda projektinum skal fullfíggja brandprojekt við tekniskum installatiónum, ið Arbeiðis- og Brunaeftirlitið skal góðkenna og rakstrarætlan fyriliggja.
Umsøkjarin má tí tola møguligar broytingar ella treytir í tí sambandi.

Harafturat skulu brandinstallatiónir og allar tekniskar installatiónir, ið Arbeiðs- og Brunaeftirlitið skal góðkenna, góðkennast áðrenn endaligt byggiloyvið verður givið.

Bygningsánarin hevur eisini ábyrgdina av, at fáa neyðug loyvir og góðkenningar, frá øðrum myndugleikum til byggingina og raksturin. Herundir eisini at lúka ásetingar og treytir um útlát, óljóð, atkomuviðurskifti og arbeiðsumhvørvi, ið Umhvørvisstovan ella aðrir myndugleikar áseta í tí sambandi.

Kommunan ber ongan kostnað av bygging, vegagerð, kloakk, leiðingum og tekniskum- og bruna installatiónum o.a. í tí sambandi.

Rottangastødd skal ásetast soleiðis, at hesir verða tømdir ikki oftari enn eina fer árliga. Neyðugar tekningar og upplýsingar skulu sendast byggivaldinum at góðkenna.

Bygningurin skal verða í fullum samsvar við galdandi lógir og ásetingar, herundir byggilógina, BK17 og góðkendu byggisamtyktina. Byggingin liggur í D4 og byggingin tískil løka øll krøv, herundir kravið um mest loyvdu byggihædd 12 m til yvirgrindina og 15m til mønuna, umframt tær í umsóknini uppgivnu upplýsingar.

Tá bygningar eru avsettir, skal byggivaldi hava boð um hettar og byggiharrin framsenda upplýsingarnar í talgildum formi og í FOTM-koordinatskipan til byggivaldi, áðrenn byrja verður.

Byggingin skal verða í fullum samsvar við galdandi lógir og ásetingar og tær í umsóknini uppgivnu upplýsingar.

Endaligt byggiloyvi verður útskriva, tá omanfyri nevndu krøv eru avklára og umsitingin hevur móttikið og gjøgnumgingið eitt fullfíggja prosjekt.

Byggingin kann ikki takast í nýtslu, fyrr enn kommunan hevur útskriva nýtsluloyvi, fyri partar ella samlaðu byggingina.

Vágs Kommuna ognar sær rættin til avgresturin frá verkætlaniniog vil Vágs Kommuna vísa á økið og ásetur treytir fyri hvussu og hvar avgrevsturin skal tyrvast á øki í kommununi.
Arbeiðsánarin ber allan kostnað og ábyrgd av flutningi, tyrving og útlegging av avgrevstrinum á økinum. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at kommunan eisini kann tyrva mold og avgrevstur á plássinum, meðan hettar arbeiðið verður gjørt.